VINNU SÍÐURNAR

Nr. 42 • mikudagur • 2. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Kann fáa týdning fyri Føroyar eisini:

# Oljurisi á Atlantsmóti vaktur úr dvala



*Framleiðslupallurin á Clair, er tann fyrsti av sínum slag á Atlantsmótinum*

*Mynd BP*

**Tað skuldu ganga næstan 30 ár frá tí at eitt tað størsta oljufundið í bretskum øki nakrantíð varð gjørt, til framleiðsla kundi byrja. Risastóra Clairfeltið, sum varð funnið í 1977, varð hósdagin í farnu viku tikið í brúk. Fyrsta oljan kundi renna gjøgnum 110 metrar longu leiðingina til Sullom Voe oljuterminalin í Hetlandi. Útbyggingin hevur kostað millum 8 og 10 milliardir krónur.**

OLJA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Talan er um eina stórhending í oljuhøpi og hevur hetta eisini nakað at siga fyri Føroyar og tey feløg, sum vilja brúka orku og pengar at leita eftir olju her og í grannalagnum.

Clairfeltið, sum verður mett at goyma einar 5 milliardir tunnur av olju, liggur miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið ella einar 47 fjórðingar úr Hetlandi og á 140 metra dýpi. Tá oljufelagið BP fann hesa stóru oljukelduna var Atlantsmótið nærum ókent í oljuverðini. Men tað skuldi vísa seg, at oljugoymslurnar í Clairkelduni vóru so háttaðar og oljan so mikið tung og ring at hava við at gera, at tað var ikki mett lønandi tá síðst í 70-árunum at fara undir at tilrættaleggja eina framleiðslu. Mett var at tað fór at verða neyðugt at bíða, til tøknin var meira ment til tess at kunna fara undir framleiðslu. Og so skuldi verða. Fyri nøkrum fáum árum síðani fóru BP og tess partanarar so undir eina útbyggingarætlan, har tað í fyrstu atløgu varð farið undir eina útbygging í einum parti av tí stóra oljufeltinum. Henda útbygging var liðug í farnu viku og hevur kostað ikki minni enn millum 8 og 10 milliardir krónur.

Fyrsti parturin av Clairútbyggingini, sum ætlandi verður í trimum stigum, er mettur til at kunna framleiða 60.000 tunnur av olju um dagin og nakað væl av gassi eisini. Hesin parturin av oljukelduni er mettur at goyma 250 mill. tunnur. Ætlanin er at øll olja skal flytast til Sullom Voe í Hetlandi umvegis ein oljukaðal á havbotninum, meðan gassið verður flutt umvegis gassleiðing til oljufeltið Magnus norðan fyri Hetland.

Umframt BP, sum er fyristøðufelag og eigur 28,8% í Clair, eru eisini ConocoPhillips við 24%, ChevronTexaco við 19,4%, Shell við 18,7% og Amerada Hess við 9,3%. Alt Clair oljufeltið fevnir um fimm ymsar teigar, 206/7a; 206/12; 206/8; 206/13a; and 206/9.

Upplatingin av Clair oljufeltinum varð hátíðarhildin hósdagin. Umboð fyri eitt nú BP vórðu til steðar. Teirra millum Tony Hayward, stjóri fyri leiting og framleiðslu umframt sjálvur ráðharrin fyri orku, Mike O´Brien.

Áhugavert er at leggja til merkis, at framleiðslupallurin, sum er bygdur til Clairfeltið, er tann fyrsti av sínum slag nakrantíð vestan fyri Hetland. Á hinum oljufeltunum vestan fyri Hetland, sum framleiða olju, verða oljugoymsluog framleiðsluskip, sonevnd FPSO, brúkt. Tað er so mikið grunt á Clairøkinum, at tað hevur verið mett lønandi at hava ein framleiðslupall har heldur enn framleiðsluskip.

– Hetta er ein stórur dag-